# Stokkholmssyndromið

HELGI ABRAHAMSEN
løgtingsmaður



Tónleikabólkurin 200 er komin á marknaðin við eini nýggjari fløgu, sum nevnist Stokholmssyndromið. Fløgan hevur fingið navn eftir teirri sinnisstøðu, sum gíslar koma í, tá teir velja at elska sínar gíslatakrar. Við hesum vilja teir í 200 vísa á, at føroyingar eru gíslar hjá dønum, men at vit kortini elska henda ræðuliga »gíslatakaran«, sum náðileyst dýkir okkum undir við pengum og góðum tænastum.

Men lat okkum hyggja eftir hesum spurninginum, um vit eru gíslar.

**Valdið liggur í Føroyum**

Tað er einki at ivast í, at áðrenn heimastýrislógin varð sett í gildi í 1948, høvdu tey flestu ta fatan, at alt tað politiska valdið lá í Danmark. Við Heimastýrislógini fingu føroyingar ein part av hesum valdinum – tó ikki alt.

Men í dag er støðan ein onnur. Skiftandi danskir forsætismálaráðharrar hava sagt, at tað eru føroyingar sum gera av, um vit vilja verða verandi í ríkisfelagsskapinum ella ikki. Eisini er lógin nú orðað soleiðis, at vit sjálvi ráða fyri, nær málsøki verða yvirtikin. Alt valdið liggur sostatt hjá Føroya fólki og tað stendur okkum frítt at ríma úr ríkinum. Synd er at siga, at hetta minnir um eina gíslatøku.

Summi taka beinleiðis undir við galdandi skipan, meðan onnur í verki hava víst, at tey ikki hava gjørt allar tær yvirtøkurnar, sum stóðu teimum í boði, og tey hava heldur ikki tikið fullveldi, tá tey høvdu tann møguleikan. Harumframt hava tey latið seg valt á fólkating at løggeva fyri felagsmálini og hava harvið viðurkent fólkatingið sum løggávuting fyri Føroyar.

**Eru ikki gíslar**

Vit hoyra ofta hesi orðini, at vit skulu vera gíslar ella trælir, men neyvan finst nakar gísli ella trælur í heiminum, sum ikki gleðiliga hevði vilja býtt síni lívskor um við korini hjá føroyingum. Eg hevði eisini vilja sæð tann føroying, sum hevði vilja býtt um við ein træl.

Vit eru ikki gíslar, men vit vilja vera í ríkisfelagsskapi, tí vit hava tað betri innan fyri ríkisfelagsskapin enn vit høvdu havt tað uttanfyri. Og danir kunnu ikki gera við, at føroysk loysingarfólk ikki tora at loysa, av ótta fyri at missa teir ágóðar, sum henda »gíslatøkan« gevur teimum.

Nei gíslar eru vit ikki, og tann sum heldur, at vit eru tað, kann ikki hava skilt rættiliga, hvat ein gísli er fyri nakað.

Ein annar spurningur er, um tað ikki er okkurt slag av stokholmssyndromi, tá tað ganga fólk í Føroyum og elska politiskar flokkar, sum arbeiða við hond og fót, fyri at taka vælferðatænasturnar frá teimum til frama fyri politiskt vald og fullveldi.

# Føroyar við í nýggj krepputiltøk innan Ríkisfelagsskapin

EDMUND JOENSEN
løgtings- og fólkatingsmaður



Í tøttum samstarvi við felagar okkara í Ríkisfelagsskapinum koma Føroyar heilskapaðar úr búskaparkreppuni. Tí skulu Føroyar so vítt møguligt við í komandi "vakstrarpakkan", tá hann er klárur

Kreppan ýlir eftir okkum her fyri norðan í Atlantshavinum.

Her um okkara leiðir er kreppan í summar mátar eitt sindur øðrvísi og kann gerast verri enn hon, ið vísir tenn aðrastaðni í heiminum.

**"Triðja" bylgjan**

Eins og onnur lond hava vit sæð, hvussu fyrst tann sonevnda "kredittklemman" rakti bankar og fyritøkur. Síðani áttu útflutningsfyritøkurnar tørn. Tær fingu trupult við at fíggja útflutningin samstundis, sum eftirspurningurin linkaði.

Nú eru vit komin til "triðju bylgjuna".

Vit síggja nú, hvussu tað veruliga treingist hjá fyritøkunum. Summar fara av knóranum, og tær flestu skerja rakstrarútreiðslurnar. Fleiri gerast arbeiðsleys, og almennu inntøkurnar falla. Knallreyð tøl síggjast á almenna budgettinum.

Í Føroyum legst steinur oman á byrðu.

Vit eru framvegis bundin at fiskaútflutninginum, og á hesum øki er støðan alt annað enn góð. Tilfeingið og møguleikarnir fyri Føroyar eru illa umsitin seinnu árini, og prísirnir eru sum heild lægri enn áður. Fleiri kappingarneytar njóta gott av at hava lækkað síni gjaldoyru, og eitt sindur longri frammi hóttir oljuprísurin við at hækka aftur.

Tí er okkara kreppa øðrvísi. Og støðan kann gerast álvarsom, hóast vit ikki enn hava sæð, at fólk eru kroyst frá húsi og heimi, og hóast fá munnu ganga svong her um okkara leiðir.

**Kreppuloysnir tvørtur um hav**

Kreppur krevja aloftast politisk inntriv og tiltøk, og tað mesta, ið higartil er gjørt, er komið frá okkara samstarvsfeløgum í Ríkisfelagsskapinum.

"Kredittklemman" varð loyst í sonevndu "bankapakkunum" frá donsku stjórnini, ið eisini fevnir um okkara peningastovnar. Útflutningurin av fiski er stimbraður nakað umvegis eksportkredittskipanina hjá stjórnini.

Her, sum so mangan, hevur felagsskapurin verið okkum hollur.

Landsstýrið er nú eisini komið við nøkrum góðum tiltøkum. Bústaðarpakkin kann stimbra byggivinnuna, og nýskipanin av ALS kann taka toppin av tí skaða, sum arbeiðsloysið hevur við sær.

Henda kreppan sær út til at kunna gerast drúgv, og tí er neyðugt við fleiri tiltøkum.

**Vit skulu við í krepputiltøkini**

Fyri mær er púra greitt, at Føroyar framhaldandi mugu verða partur av teimum krepputiltøkum, ið danska stjórnin kemur við.

Trupulleikin hjá okkum í Føroyum er, at vit hava ein lítlan, opnan og sera sárbæran búskap, ið er lættur at syfta um koll í teimum tíðum, vit nú uppliva.

Tí hava vit stóran fyrimun av at koma við í tey tiltøk, sum stjórnin letur upp fyri. Eitt nú er púra upplagt, at vit so vítt møguligt gerast partur av tí sonevnda "vakstrarpakkanum", tá hann kemur.

Hesum fari eg at virka fyri í Fólkatinginum.

Landsstýrið eigur støðugt at hava gott samband við stjórnina og at tryggja, at Føroyar hava møguleika at koma við í krepputiltøkini, ið Ríkisfelagsskapurin gevur okkum rættin til.

Í tøttum samstarvi við okkara felagar í Ríkisfelagsskapinum koma Føroyar heilskapaðar úr búskaparkreppuni.

# Nýggja Trygdarmiðstøð í Klaksvík

BJØRN KALSØ
løgtingsmaður



Sitandi samgongan hevur í samgonguskjalinum sett sær fyri at loysa hølistrupulleikarnar hjá Trygdarmiðstøðini í Klaksvík. Hetta kann gerast við at byggja nýtt ella við at keypa hóskandi hølir til endamálið. Nú landsstýrið er farið undir at gera tillagingar í íløguætlanini fyri 2009, eigur spurningurin um nýggja Trygdarmiðstøð at verða tikin við og raðfestur.

**Byggja nýtt ella keypa hóskandi bygning**

Undanfarna ABC-samgonga var komin langt áleiðis við fyrireikingunum til tess at fara undir at byggja nýggja Trygdarmiðstøð í Klaksvík. Peningur var eisini settur av til endamálið. Ætlanin varð tó fullkomuliga slept tá CHE-samgongan tók við. Sitandi ABC-samgonga hevur aftur sett málið á dagsskrá og hevur í samgonguskjalinum ásett, at: "Hølistrupulleikarnir hjá Trygdarmiðstøðini verða loystir". Eisini í álitinum til fíggjarlógina fyri 2009 verður mælt til at: "fyrireikingarnar at byggja nýggja trygdarmiðstøð í Klaksvík eiga at halda fram".

Nú landsstýrið arbeiðir við at gera tillagingar í samband við íløguætlanina, og í tí sambandi fer at leggja eykajáttanarlóg fyri Løgtingið í vár, eigur spurningurin um Trygdarmiðstøðina at verða tikin við og raðfestur.

**Íløgur úti um landið neyðugar**

Fíggjarnevndin legði í sínum fíggjarlógararbeiði dent á at spjaða íløgurnar út um landið. Nú landsstýrið arbeiðir við at gera tillagingar í íløguætlanini er umráðandi at hildið verður fast við hendan leistin.

Sum skilst verður tíverri ikki gjørligt at nýta allan peningin, sum settur er av til tunnil Norður um Fjall og byrgingina um Haraldsund í ár. Hetta eigur at geva pláss fyri at skunda undir ætlanina at loysa hølistrupulleikarnar hjá Trygdarmiðstøðini, sum ásett í samgonguskjalinum. Somuleiðis vil ein slík ætlan byrgja fyri, at íløgupeningurin hvørvur úr Norðoyggjum, sum í løtuni eru sera illa fyri orsakað av niðurgongdini í fiskivinnuni. Almenn arbeiðspláss og byggivirksemi hava tí alstóran týdning.

Fari av somu orsøk at mæla landsstýrismonnunum í ávikavist fiskivinnu- og fíggjarmálum til at laga tillagingarnar á íløguætlanini soleiðis at farast kann undir at byggja nýggja Trygdarmiðstøð alt fyri eitt, ella í øðrum lagi, at hóskandi høli verða keypt í Klaksvík, sum verða umbygd til endamálið.

# Fosturtøka: Hugburður broytist. Gud broytist ikki

RICHARD DANIELSEN



Malan Egholm skjýtur upp í Dimmalætting týsdagin 14. apríl at peningurin, sum verður latin Pro Vita, heldur skuldi farið til teir lærarar og heilsufrøðingar, sum standa fyri sexualundirvísingini. Hon heldur eisini, at longu í barnagarðsaldri eiga børnini at ávirkast, hon nevnir okkurt har, sum ikki kemur heilt greitt fram, men hetta skal ávirka kynslívið hjá teimum seinni, soleiðis at alt skal gerast betri.

Malan Egholm hevur fyrr roynt saman við fólkaheilsuráðnum at minka um kynsjúkur í Føroyum millum ung á ein hátt, sum als ikki kann góðtakast. At børn í barnagarðsaldri nú eisini verða nevnd í samband við sex er óhugnaligt. Mong foreldur eru, sum noyðast at lata børn síni í barnagarð, tí at samfelagið er bygt upp á tvær inntøkur, tað man vera ræðandi hjá teimum at hugsa um, at hetta nú kanska verður tað næsta, sum hendir. Vónandi fáa hesar ongantíð hetta ígjøgnum.

Her verður altso skotið upp, at peningurin verður tikin frá Pro Vita, sum arbeiðir fyri at verja fostrini, og latin til tey, sum undirvísa í sex. Eg minnist væl, tá ið henda undirvísingini byrjaði at sníkja seg inn í skúlan í Fuglafirði, tað hevur verið í trýssunum hugsi eg. Hendan undirvísing hevur óiva gjørt nógv meiri ilt enn gott. Tað er, í hvussu er, nú hesi seinastu 40 árini, at alt er farið av skriðuni til í Føroyum viðvíkjandi, hvat sømir seg, tó skal verða lagt avtrat, at onnur ting hava ávirkað til støðuna, t.d. sjónvarpið.

Hugburðurin er sostatt broyttur í Føroyum. Eg haldi at onkur hevur nevnt, at helvtin av føroyingum er fyri fríari fosturtøku. Tað er ræðuligt, einki minni. Man skuldi trú, at menniskju, um tey ongum trúgva, so hóast alt høvdu virðing fyri tí, sum tey síggja. Vit síggja øll hetta undurið aftur og aftur, sum hendir, og tað hendir hvønn dag, og so hava so lítla virðing fyri hesum, tað er beteinkiligt.

Men Gud broytist ikki, hann hevur greitt sagt okkum, hvat hann vil, at vit skulu trúgva og gera.

Gamli sáttmálin, lógin:

Tú mást ikki dríva hor. 2. Mósebók 20, 14.

Nýggi sáttmálin, náðin:

Eg sigi: Livið í Andanum, so fullføra tit ikki girnd holdsins! Galatiabrævið 5,16.

Verk holdsins eru opinber; tey eru: Siðloysi, óreinska, skammloysi, osf. 5,19

Men hesi spotta tað, sum tey kenna ikki; og tað, sum tey av náttúruni vita um - eins og dýrini, ið einki vit hava - við tí oyða tey seg sjálv. Judas v. 10.

Tað er hópurin av skriftstøðum bæði í gamla og nýggja testamenti, sum vísa á, hvussu álvarsamt og oyðandi tað er at dríva siðloysi.

At enda til tann, sum tekur sín kristindóm í álvara:

Tit eru jú kallaðir til frælsi, brøður! Nýtið bert ikki frælsið holdinum til høvi, nei, tænið í kærleika hvør øðrum! Gal. 5,13.